# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# Óvissa á partabrævamarknaðunum tær næstu vikurnar

**Tað er ilt at siga, hvussu drúgv kreppan á altjóða fíggjarmarknaðinum verður, men sambært danska búskaparfrøðinginum Steen Bocian verða tær næstu vikurnar merktar av óvissu**



*Sjálvt um USA samtykkir sín hjálparpakka, fer óvissa at valda tær næstu vikurnar, sigur Steen Bocian*

(Mynd: Polfoto)

Sum væntað fall partabrævavirðið nógv í dag, eftir at amerikanska Umboðsmannatingið vrakaði kreppuhjálparuppskotið hjá stjórnini og leiðslunum í teimum báðum flokkunum. Longu frá morgunstundini frættist frá stórum falli í Japann, og á marknaðinum í Tokyo var fallið tað størsta í trý ár. Eisini á avstralska marknaðinum var fallið stórt, og eftir einum korteri var virðið fallið meiri enn fýra prosent.

Hendan sama gongdin helt fram í Evropa. Tá marknaðurin í Moskva lat upp, fall partabrævavirðið í orkufelagnum Gazprom heili 7,8 prosent og í oljufelagnum Rosneft heili 8,0 prosent. Tað var so mikið nógv, at leiðslan á partabrævamarknaðinum í Moskva gjørdi av at steðga øllum handli við partabrøvum klokkan hálvgum tíggju okkara tíð.

Hetta er aðru ferð teir seinastu 14 dagarnar, ar russisku partabrævamarknaðirnir hava latið aftur orsakað av stórum falli.

Á marknaðinum í Keypmannahavn og á hinum marknaðunum í Vesturevropa byrjaði dagurin eisini við stórum falli. Millum teir størstu taparnarnar á marknaðinum í Keypmannahavn vóru FL Smidt og vindmyllufyritøkan Vestas, sum mistu ávikavist 6,12 og 5,59 prosent av virðinum longu tíðliga í mnorgun. Men sum frá leið rættaðu kursirnir seg, og beint eftir klokkan 10 fyrrapartin var javnvág í, og tað sama hendi á hinum evropeisku marknaðunum.

### Óvissa

Steen Bocian, sum er leiðandi búskaparfrøðingur hjá Danske Bank, segði við danska kringvarpið í dag, at fallið á marknaðunum var størri, enn hann hevði væntað. Hann segði seg kortini hava vónir um, at gongdin fer at venda, tá amerikanska Kongressin ætlandi fer at samtykkja hjálparpakkan seinni í vikuni.

Men sambært Steen Bocian hevur marknaðurin ikki tíð at bíða leingi eftir amerikanska hjálparpakkanum, tí gongur ov long tíð við óvissu, kann marknaðurin enda í einari óndari ringrás. Men tann amerikanski pakkin loysir ikki allar trupulleikar beinanvegin, og tí verða tær næstu vikurnar merktar av óvissu, sigur Steen Bocian.

Spurdur, hvat tey, sum eiga partabrøv, skulu gera, soleiðis sum støðan er vorðin, sigur búskaparfrøðingurin, at tað er ikki so nógv at gera. Hann vísir á, at soleiðis sum kursirnir eru, er tað ikki serliga eggjandi at selja, men hinvegin eiga íleggjarar eisini at gera sær greitt, um teir hava hug at virka í einum marknaði, sum ikki er komin á botn enn.

- Men hava fólk hug og ráð, so eru partabrøv framvegis ein góð íløga, sigur Steen Bocian við DR.

# Fleiri danskir bankar afturat kunnu koma í kreppu

**Fíggjareftirlitið kannar nú støðuna hjá donskum peningastovnum, og sambært serkunnleikanum kunnu fleiri fáa trupulleikar**




*Fíggjareftirlitið vil hava upplýsingar frá 24 bankum*

(Mynd: Polfoto)

Bankatalið í Danmark minkar. Í gjár bleiv fráboðað, at tríggir bankar høvdu keypt Roskilde Bank, og samstundis bleiv kunngjørt, at Vestjysk Bank og Ringkøbing bank høvdu lagt saman, og at Vestjysk Bank í hesum viðfangi hevði yvirtikið Bonusbanken.

Sambært Politiken eru hetta neyvan teir seinastu handlarnir av hesum slagnum, og blaðið sigur seg eisini hava skilt, at tað kemur eingin bankabjarging frá almennari síðu, fyrr enn teir smáu bankarnir hava sannað, at teir kunnu ikki halda fram sum sjálvstøðugir bankar.

Teir seinastu dagarnar hevur javnan verið spurt, hvat Fíggjareftirlitið ger, og í gjár boðaði eftirlitið frá, at tað hevði biðið 24 bankar upplýsa, hvussu stórur partur av teirra útlánum er í fastari ogn.

Varastjórin í Fíggjareftirlitinum, Kristian Madsen, sigur við Politiken, at fyrispurningurin um upplýsingar merkir ikki, at eftirlitið hevur illgruna um trupulleikar, men at ætlanin bara er at kanna, um alt er, sum tað eigur at vera, ella um nakað skal gerast afturat.

# Hátíð forðar avgerð í USA

**Ein jødisk hátíð ger, at amerikanska Kongressin kann ikki taka støðu til hjálparpakkan fyrr enn í fyrsta lagi í morgin**



*Nancy Pelosi og hinir leiðararnir í Umboðsmannatinginum vóru álvarssom aftan á atkvøðugreiðsluna*

(Mynd: Polfoto)

Síðani Umboðsmannatingið vrakaði uppskotið um at brúka 700 milliardir dollarar til at hjálpa fíggjarmarknaðinum við, hava umboð fyri demokratarnar og republikanararnar roynt at finna eina neyðsemju, sum kann fáa meiriluta í Umboðsmannatinginum og Senatinum.

Tað vóru serliga teir republikonsku floksfelagarnir hjá forsetanum, sum atkvøddu ímóti uppskotinum. 133 republikanskir tinglimir atkvøddu ímóti, og 65 atkvøddu fyri. Hjá demokratunum atkvøddu 95 ímóti og 140 fyri.

George W. Bush, forseti, segði aftan á atkvøðugreiðsluna, at Kongressin noyðist at semjast um eina loysn, og tey bæði forsetavalevnini, Barrack Obama og John McCain, heittu á Kongressina um at finna eina semju.

# Rentan á húsalánum kann fella nógv

**Ófriðurin á fíggjarmarknaðinum kann hava við sær, at rentan á húsalánum kann fella nógv tey bæði næstu árini**

Ta seinastu tíðina er rentan á pengamarknaðinum (rentan, sum bankar krevja frá hvør øðrum) hækkað nógv, og tað hevur havt við sær, at rentan á vanligum útlánum eisinmi er hækkað tær seinastu vikurnar. Búskaparfrøðingar siga, at marknaðarrentan fer uttan iva at hækka uppaftur meiri, og tað fer at hava við sær, at rentan á bústaðarlánum fer at hækka, sum frá líður.

Men hetta verður ikki varandi, tvørturímóti, og tí vænta fleiri búskaparfrøðingar, at rentan fer at fella. Ein teirra er Frank Jullum, sum er leiðandi búskaparfrøðingur í norska Fokus Bankanum.

- Heimurin stendur á gáttini til eina búskaparliga afturgongd, sum fer at trýsta marknaðarrentuna niður, og tað er ikki óhugsandi, at rentan á norskum bústaðarlánum, sum nú er átta prosent, verður trý prosent um eini tvey ár, sigur Frank Jullum við Aftenposten.

Erirk Bruce, búskaparfrøðingur hjá Nordea-bankanum, væntar eisini, at rentan fer at fella tey næstu árini, men ivast í, at tað verður fimm prosent.